# www.javnratt.fo - fleiri kvinnur á ting

**Mánadagin kemur heimasíðan hjá Javnstøðunevndini á telduskíggjan í nýggjum skapi og við nýggjum innihaldi við høvuðsheitinum 'Fleiri kvinnur á Ting'**




Málið er at upplýsa og kunna heimasíðulesarar um ójavnstøðuna í talinum av mannligum og kvinnuligum løgtingslimum. M.a. verður greitt frá, hvønn týdning, tað hevur fyri samfelagið, at kvinnur hava lítla politiska ávirkan. Greitt verður eisini frá nøkrum av orsøkunum til, at so fáa kvinnur stilla upp og verða valdar inn á Ting. Eins og nøkur boð uppá møguligar loysnir á hendan trupulleikan, verða givin.

**Hví skulu fleiri kvinnur veljast inn?**
Turið Debes Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini sigur, at tað er av týdningi, at fleiri kvinnur verða valdar á Ting, og tí hevur Javnstøðunevndin gjørt av at varpa ljós á hetta mál:

"Eitt vælvirkandi samfelag krevur aktivar samfelagsborgarar, sum gera sína ávirkan galdandi, tá raðfestingar verða gjørdar og avgerðir tiknar. Ikki bert tey gomlu, sjúku og veiku hava fyri neyðini at verða aktivir borgarar, um tey skulu vænta at fáa áhugamál teirra rímuliga raðfest. Eisini tey ungu mugu vísa á sín tørv.

**Og hvussu við kvinnunum?**
Umframt at tær eru bæði ungar og gamlar, sterkar ella veikar, so telja tær helmingin av landsins borgarum. Er tað annað enn ein sjálvfylgja at tær, júst tí tær eru kvinnur oftast raðfesta øðrvísi enn menninir? Kann samfelagið ella tann politiski leikpallurin yvirhøvur vera hesar røddir fyriuttan.

Kvinnurnar telja helmingin í samfelagnum og eru annar helmingurin í hjúnalagnum, sum samfelagið í dag fyri stóran part enn byggir á.

Kvinnurnar á tingi í dag eru bert 5 av íalt 32 limum. So her haltar stórliga og javnvág er ongin. Prosentbýtið er 15% kvinnur og 85% menn.

Í 1994 fingu 16% av teimum uppstillaðu kvinnunum 12 % av atkvøðunum. Í 1998 fingu 18 % av teimum uppstillaðu kvinnunum 12 % av atkvøðunum.

Latið okkum stuðla teimum, sum nú eru uppstillaðar, so ár 2002 gerst árið, har kvinnurnar sita á 25% av Løgtingssessunum og harvið fáa møguleika at gera seg galdandi á politiska leikpallinum og virka fyri einum meiri fjølbroyttum virksemi á Tingi."

**Innihaldið á heimasíðuni frá 8. - 14. apríl**
Høvuðsevnir
Dagny Joensen: Hoyrast kvinnuligu politikkararnir?
Bjørt Samuelsen: Hví siga kvinnur nei til at verða uppstillaðar?
Rói Patursson: Skulu kvinnur vera uppi í politikki?

**Politikkur**
8-10 kvinnuligir politikarar verða lýstar
Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin lýsa teirra tankar og ætlanir um javnstøðu

**'5 á netinum'**
Hvussu kemur ójavnstøðan til sjóndar í dagsins samfelagi?

**Innihaldið á heimasíðuni frá 15. — 21. apríl**
Høvuðsevnir
Helena D. á Neystabø: Tankar um arbeiðsháttin í tinginum – nøkur góð ráð?
Malan Johansen: Hvat hevði tú broytt, um tú kom á Ting?
Jógvan Mørkøre: Hvønn týdningi hevur tað fyri samfelagið, at kvinnur hava lítla politiska ávirkan...?

**Politikkur**
8-10 kvinnuligir politikarir verða lýstar
Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin lýsa teirra tankar og ætlanir um javnstøðu

**'5 á netinum'**
Hvat kann gerast betur, um fleiri kvinnur koma á Ting?

**Innihaldið á heimasíðuni frá 22. - 28. apríl**
Høvuðsevnir
Bergtóra Hanusardóttir: Hvat kann gerast betur í samfelagnum, um kynsbýtið í Tinginum verður javnari
Heri Kragesten: Hví tora/ynskja vit ikki broytingar?
Ólavur Rasmussen: Fordómar

**Politikkur**
8-10 kvinnuligir politikarir verða lýstar
Miðflokkurin og Fólkaflokkurin lýsa sínar tankar og ætlanir um javnstøðu

**'5 á netinum'**
Hví heldur tú, at summi fólk ikki vilja atkvøða fyri einari kvinnu?

**Hvørja viku**
Turið Debes Hentze: Innleiðing um kvinnur og politikk
Heimasíðuvitjandi svara: Heldur tú, at fleiri kvinnur áttu at havt sæti í Tinginum?
Slóðir til danskar greinar og annað tilfar um javnstøðu

**Vilt tú vita meira?**
Nevndin:
Turið Debes Hentze, forkvinna, sett av Landsstýrinum tlf 311460 hentze@post.olivant.fo

- Jan Mortensen, Vinnuhúsið, settur av arbeiðsgevarunum jan@industry.fo
- Kirsten Brix, sett av skúla-, heilsu-, og almannaverkinum kirsten.brix@hoydalar.fo
- Jancy Olsen, sett av KSF jancyo@post.olivant.fo
- Harry Johannesen, settur av løntakarunum harmar@post.olivant.fo

**Samskipari:**
Annika W. Joensen, annikaw@post.olivant.fo, tlf. 212848

**Webmaster:**
Snæbjørn í Dali, kt200@kallnet.fo, tlf. 321211


# Bussferðir

## til Týsklands
***24.05. - 03.06.***
***í sambandi við at tað eru 62 ár síðani týskur kavbátur søkti sluppina "Union Jack"***





*Íroknað prísin er:*
*Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað, 7 nætur á hotelli í Týsklandi, íroknað ½ vistarhald. Hartil føroyskur bussur á allari ferðini og atgongumerki til ymisku støðini vitjað verða á ferðini.*

**úr 6.295,-**





## til Noregs
***17.06. - 26.06.***
***Vitjað verður m.a. í Gudvangen, Lærdal, Lillehammer, í Gudbrandsdalinum, í Lom, Geirenger, við Sognefjørðin, Balestrand og Bergen***

*Íroknað prísin er:*
*Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari við handvaski, 7 nætur á hotellum í dupultkamari v. WC/bað, íroknað ½ vistarhald. Hartil føroyskur bussur og ferðaleiðari.*

**úr 5.995,-**



SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo
team85


†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi
og langabbi okkara

**Hans Ove Venned**

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 4. apríl,
67 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum heim í kirkjuna
leygardagin kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
sunnudagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Óluva**
**Venni, Sigrid, Sigfríður og Martin við familjum**







Demens merkir at fara úr sinni. Tú gerst óhjálpin og veitst at enda ikki, hvør tú ert. Tíni næstu noyðast at taka ræðið og ábyrgdina. Tað er mannminkandi, óvirðiligt og tyngjandi. Tí verður demens ofta nevnd »sjúka teirra avvarðandi«.

Roknað verður við, at 300 føroyingar eru illa sjúkir av demens. Sostatt eru nógv, ið hava stóran trupulleika at ansa teimum, tey liva saman við og eru góð við.

Tey avvarðandi kenna seg slept upp á fjall. Tey eru gloymd, hóast tíðirnar eru góðar. Samfelagið stendur í blóma, bygningar, tunlar og stór skip verða aftur bygd, men lítið er gjørt fyri at bøta um korini hjá teimum gomlu og minnisveiku.

Hagtølini siga, at fimti hvør okkara yvir 65 ár fær demens. Og tá ið tey gomlu gerast ein alsamt størri partur av samfelagnum, verður trupulleikin samsvarandi størri og truplari. Tørvurin á røktarheimsplássum er eyðsýndur.

ALZHEIMER felagið

Demenslinjan tel. 31 31 02 er opin hvønn týsdag kl. 18 til 20.

www.alzheimer.fo